# Sundalagið setur dágsskránna

**Favorittarnir úr B36 hava ilt við at fáa skikk á úrtøkuna, og hóast tað leikliga hevur gingið hampuligt hjá Skála og FS Vágum, so eru hesi liðini framvegis sør**



*HB og NSÍ hava verið roknað millum gullfavorittarnar. Tað eiga tey eisini at verða eftir góðu reklamuna, sum hesi liðini sunnudagin gjørdu fyri sær sjálvum og fótbóltsspælinum sum heild*

**2. UMFAR SAMANUM**
*Jóannes Hansen*

Største kvøkkin í vikuskiftinum fingu meistarakandidatarnir í B36. Í Gundadali høvdu teir vitjan av EB/Streymi, sum við fleiri fyrrverandi B36 spælarum á liðnum feldi heimaliðið. EB/Streymur vann 3–1, og stóri maðurin hjá gestunum var Magni á Lakjuni, sum seinatsu árini hevur spælt við B36.

Avrikið og úrslitið hjá EB/Streymi í Gundadali ber við sær spurningin, um tað nú er møguleiki fyri, at eitt heilt annað lið, enn tey, sum higartil hava vunnið FM, skal verða sigursharri í landskappingini. Um EB/-Streymur verður millum gullfavorittarnar, so verður tað annað snitt yvir síðsta umfarinum, enn tað frammanundan hevur verið spátt um. Í síðsta umfarinum skal EB/Streymur á útivølli spæla ímóti Skála!

HB og NSÍ hava verið roknað millum gullfavorittarnar. Tað eiga tey eisini at verða eftir góðu reklamuna, sum hesi liðini sunnudagin gjørdu fyri sær sjálvum og fótbóltsspælinum sum heild. Hjá NSÍ man tað ikki kennast nóg gott ikki at vinna á heimavølli, men sammett við í fjør er talan um framgongd, tí tá taptu teir minniliga heimadystin ímóti HB.

Tá ið HB áður hevur verið upp á tað besta, og teir í 2. hálvleiki hava reist seg, so hevur tað ofta eydnast hjá teimum fram ímóti dystarenda at fingið sigursmálið. Tað kundu teir havt fingið hesa ferð, men tað miseydnaðist, og tað kann vera ábending um, at HB – sammett við seg sjálvt – ikki enn er á toppinum.

### Skipanirnar

Ein spurningur undan øðrum umfari var, um KÍ fór at megna at reisa seg eftir avhølvingina næstsíðsta sunnudag ímóti B36. 2–2 á heimavølli ímóti VB boðar frá, at tað gekst klaksvíkingum væl betri, enn tað gjørdi ímóti B36. Men tað boðar eisini frá, at tað gongur rætta vegin hjá VB. Vágbingar hava verið óhepnir ikki at vinna enn. At teir fara at gera tað ofta er eingin ivi um.

At tað hevur gingið væl í yngru deildunum sæst so spakuliga aftur á VB manningini. Hesa ferð vóru Jákup Olsen og Kári í Lágabø millum teir fyrstu ellivu, og Eyðstein í Lágabø kom inn í 2. hálvleiki. Útlendingarnir eru fingnir henda vegin fyri at vera millum stuðlarnar. Tí eigur tað at koma sera illa við í Vági, at teir eru so ódrúgvir. Í fyrsta umfarinum varð ein av fremmandu monnunum hjá VB rikin av vøllinum, og í næsta umfarinum vórðu tveir útvístir. Í fjør fekk VB í átjan dystum trý reyð kort. Tað hava teir í ár rokkið, nú tvey umfør eru farin.

Tá ið B36 smurdi KÍ av næstsíðsta sunnudag, stóðust flestu málini av, at B36 gjørdi sær dælt av, at KÍ verjan lá so frammarlaga og royndi at seta rangstøðufellu. VB megnaði onkra ferðina at fáa nyttu burturúr hesum, men vágbingar hava ikki so hvassar álopsspælarar, sum B36 hevur í Jákupi á Borg og John Petersen. Men tað hava onnur feløg. Eitt nú EB/Streymur, sum KÍ fer at vitja hósdagin. Fyri snildar spælarar sum Sorin Anghel og Magna á Lakjuni er tað reint guff at spæla ímóti so flatari verju, sum er so fokuserað upp á rangstøðuna, sum KÍ var tað ímóti VB.

Hjá KÍ riggar tað illa at fáa dýpd í, og so eigur tað at kosta nógv. Serliga tá ið fleiri av verjuspælarunum ikki teljast millum teir skjótastu. EB/Streymur megnaði at halda ímóti KÍ vandamiklu B36 skjúttunum burtur frá málinum hjá Gunnari á Steig. Tí er upplagt hjá klaksvíkingum, at teir spyrja seg fyri hjá onkrum av nógvu fyrrverandi KÍ spælarunum í B36, hvørji vápnini hjá EB/-Streymi eru!

B68 venjarin hevði undan grannauppgerðini á Skála tikið avleiðingarnar av, at flata verjan ikki riggaði nóg væl. B68 verjan kundi havt riggða betri, enn hon gjørdi leygardagin. Men spentu støðurnar stóðust meiri av persónligum mistøkum, heldur enn av, at skjótu menninir í fremstu røð hjá Skála runnu seg leysar innanfyri B68 verjuna.

### Trýstið økist

GÍ og Skála hava spælt tríggjar dystir. Gøtumenn eru fremstir, og Skála er aftast. GÍ hevur higartil saknað fleiri lyklaspælarar, og sunnudagin vóru teir fyri tað mesta bara tíggju. Tí bera avrikini og úrtøkan higartil boð um, at tað skal roknast við gøtumonnum.

Hvørja ferð Skála fer av vøllinum uttan at hava fingið stig og uttan at hava skorað, økist trýstið á teimum. Tað ger tað eisini á FS Vágum, sum hesa ferð ikki megnaði at fáa stig burturúr á heimavølli, hóast teir størsta partin av tíðini vóru yvirmannaðir.

Hjá bæði Skála og FS Vágum verður talan um stórar bitar hósdagin, tá ið triðja umfarið verður á skránni. Skála skal í Gundadali spæla ímóti HB, og FS Vágar skal til Vágs. Í morgin venda vit aftur til 2. deild og undanumrøðu av triðja umfarinum. Verkfallið avmarkar framvegis síðutalið, og tætta skráin hevur við sær, at umstøðurnar til undanumrøður og eftirviðgerðir ikki eru tær, sum tær annars hava verið, tíverri.

# Nýggj hondbóltsnevnd

**Við nevndarvali sum einasta mál á skránni, setti HSF á øðrum sinni aðalfundin um vikuskiftið**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*

Tá Hondbóltssambandið fyri tveimum vikum síðani helt aðalfund, varð hesin slitin, uttan at øll mál vóru avgreidd. Orsøkin til hetta var, at tað ikki hevði verið gjørligt at manna nevndina hjá sersambandinum, og tá mest sum allir nevndarlimirnir høvdu boðað frá, at teir ikki orkaðu meira, so mátti nýggjur aðalfundur ásetast.

Heilt uttan vón var tað tó ikki, at hetta varð gjørt. Greiðar ábendingar vóru um, at nakri persónar vóru, sum kundu fáa í nýggju nevndina, og leygardagin varð tíbetur eisini staðfest, at so var.

Rógvi Nielsen úr Havn var partur av fráfarandi nevndini, og hóast tað ikki var ætlan hansara, so tók hann við afturvalið eitt skeið afturat um vikuskiftið.

Afturat honum eru so komnir ein strandingur og tveir vestmenningar. Strandingurin er Evind Jacobsen, og teir báðir vestmenningarnir eru Áki Johansen og Niels Tnomas Petersen.

Við nevndarvalinum verður bert avgjørt, hvussu nevndin verður mannað. Nevndin skipar seg sjálva, og væntandi verður hetta gjørt í næstum.

Í øllum førum er greitt, at tað helst verður beinan vegin, at nýggja nevndin skal til arbeiðis. Tað hevur leingi verið ein óavkláraður spurningur, hvussu framtíðin hjá føroyskum landsliðshondbólti skal síggja út. Hóast tað ikki hevur verið sagt alt ov hart, so tykist tað nú greitt, at hetta var nakað, sum fráfarandi nevndin av givnum orsøkum vildi sleppa undan at taka støðu til, og í øllum førum gevur tað nýggju nevndini møguleika at seta sínu egnu leið úr í kortið.

Tað skal tó ganga skjótt fyri, sum skilst. Longu triðja juni er seinasta freist fyri tilmeldan til komandi HM-undankappingina í manshondbólti, og til ta tíð skal spurningurin um manslandsliðið í øllum førum vera avgreiddur. Enn er støða so ikki tikin um hini landsliðini, bæði fíggjar- og skipanarliga eru hetta spurningar, sum eru nær tengdir at hvørjum øðrum.

Tað kann í hesum sambandi eisini leggjast afturat, at landsliðsvenjarin, Lars Nedergaard, nýtti leygardagin til at greiða frá, hvussu hann ímyndar sær menningina av føroyskum hondbólti komandi árini. Ein sokallað visión 2010 varð løgd fyri aðalfundin, og partar av hesi verða so eisini millum evnini, sum nýggja nevndin skal taka støðu til komandi tíðina.



KÍ–VB 2–2 (1–1):

# VB misti á stokkinum

**Lítið sannførandi verjuparturin hjá klaksvíkingum var um reppið at kosta øll stigini, men teir bjargaðu sær við brossparki í evstu løtu**



**KÍ–VB**
*Jóannes Hansen*

Ivaleyst høvdu vágbingar frammanundan viljað selt uppgerðina í Klaksvík fyri eitt stig. Men nú kendu teir seg snýttar fyri sigurin, og tað lótu teir ganga út yvir seg sjálvar og triðja umfarið.

Tá ið tað restaðu fimm minuttir, vóru vágbingar framvegis ellivu á vøllinum, og teir komu framum 2–1. Men tá ið dómarin brikslaði fyri síðstu ferð, vóru bara níggju VB spælarar á vøllinum. Dómarin hevði lagt fimm minuttir afturat vanligu leiktíðini. Í eykatíðini javnaði KÍ til 2–2, og dómarin sendi tveir á gestandi liðnum undir brúsu.

Spælandi venjarin, Predrag Zivkovic, og Slobodan Madzar fingu báðir í yvirtíðini gula kortið tvær ferðir stungið í næsarnar. Í báðum førunum var tað fyrst fyri at mótmæla, at dómarin hevði brikslað fyri brotssparki til KÍ. Eftir at KÍ liðformaðurin, Allan Joensen, úr ellivu metrum hevði skorað (tað var um reppið, at Bjarni Johansen bjargaði) fekk spælandi venjarin eitt gult kort afturat fyri at sparka bóltin burtur, og í næstsíðsta minuttinum fekk Slobodan Madzar gult fyri vandamikið spæl.

Vágbingar kendu seg burturdømdar. Teir vildu ikki hoyra talan um, at KÍ átti brotsspark, tá ið Símun Joensen var farin um koll í brotsteiginum. Teir vildu vera við, at KÍ spælarin hevði rent seg inn í mótstøðumann og so var dottin. Men dómarin hevði aðra útlegging. Sambært honum skuldi klaksvíkingurin vera rendur um koll og hildin niðri. Tí hevði hann dømt gilta møguleikan til heimaliðið.

### Taptu og vunnu

Tá ið dómarin hevði brikslað fyri síðstu ferð, kendist tað, sum um vágbingar høvdu tapt tvey stig, og at KÍ hevði vunnið eitt. Og tað var einki at siga til, at vágbingar iðraðu seg um, at teir ikki høvdu øll stigini suður aftur við. Fram ímóti dystarenda skoraðu teir til 2–1, tá ið rangstøðufellan hjá KÍ kiksaði í høgra verjuborði, og Birgir Jørgensen, sum var púra leysur, kundi seta innaru síðuna á flata innleggið.

Gestirnir høvdu frammanundan 2–1 málinum havt stórar møguleikar at skora mál, og ein av hesum møguleikunum var risastórur. Heimaliðið royndi ofta – fyri tað mesta var tað strongt og verri enn so altíð skilagott – at seta rangstøðufelluna. Mortan úr Hørg lyfti bóltin framum KÍ verjuna í høgra borði hjá VB, hann setti sjálvur ferð á, og meðan hann hevði kós ímóti baklinjuni og fimm metrar úr málinum, vóru tríggir! liðfelagar hjá honum púra leysir undir málinum. Men avleveringin úr høgru fall so mikið seint, at Harley Bertholdsen megnaði at renna upp á tvørs og beina innlegginum út til horna.

At KÍ so ofta og alt annað enn sannførandi royndi at seta rangstøðufelluna langt frammi á vøllinum, setti stór krøv til linjuverjarnar. Teir skuldu taka støðu til, hvør spælarin hevði beinleiðis ávirkan á spælið og ikki. Í 1. hálvleiki tóktust vágbingar onkra ferðina at vera burturdømdir, tá ið álopsspælarin vendi sær frá bóltinum, meðan aftari maðurin elti bóltin. KÍ slapp við skrekkinum, men tað var alt annað enn sannførandi verjuspæl, sum heimaliðið vísti.

### Á lítlum øki

At KÍ so ofta hevði verjuspælararnar so frammarlaga, hevði við sær, at spælið ikki so sjáldan gekk fyri seg á lutfalsliga lítlum øki. Tað hevði aftur við sær, at tað vóru nógvir nærdystir, og at tað var torført at temja og finna leysar viðspælarar. Tað var torført hjá dómaranum, men hann kom væl frá uppgávuni.

Talan var ongantíð um vakurt og hugflogsríkt fótbóltsspæl. Skeivu sendingarnar og høgu og longu sendingarnar vóru ov nógvar. Men tað var støðugt tætt, intensivt og harvið spennandi.

Birgir Jørgensen setti hol á, tá ið eitt lítil korter var farið. Innleggið úr vinstru var ikki heilt neyvt, men veteranurin megnaði tíggju metrar úr málinum at toyggja seg afturav og við høvdinum at senda dygst inn við handara stólpanum.

KÍ javnaði í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat fyrra umfarinum. Atli Danielsen stakk fram til Eyðun Klakstein í høgru, og hesin sendi av baklinjuni og flatt framvið øllum og til handara stólpan, har Hjalgrím Elttør stýrdi bóltinum í málið.

Hóast VB fram ímóti dystarenda hevði størru møguleikarnir at vinna, so var KÍ álopsliga væl við fyrrapartin av 2. hálvleiki. Eina ferð fekk KÍ bóltin í málið, men tað varð kolldømt orsaka av rangstøðu, og eina ferð smekkaði hálvskaddi Ove Nysted, sum varð settur inn í álopið fyri at leggja trýst á, úr seytjan metrum og eitt sindur úr høgru og í handaru stólparótina.

Men tað bleiv eitt stig í part. Aftaná er einki at ivast í, at vágbingar iðra seg um, at tveir spælarar hjá teimum syrgdu fyri, at tað ikki verður besta liðið, sum hósdagin fer at taka ímóti FS Vágum á Eiðinum. Klaksvíkingar mugu styrkja um verjupartin, um teir skulu hugsa um nakað sum helst, tá ið teir hósdagin fara til Eiðis.

### KÍ–VB 2–2 (1–1)

0–1: Birgir Jørgensen 13.
1–1: Hjalgrím Elttør 45.
1–2: Birgir Jørgensen 85.
2–2: Allan Joensen br 90.
**Dómari:** Petur Skarðenni
**KÍ:** Kartin Joensen – Harley Bertholdsen (Arnold Joensen, 82.), Jan Andreasen, Sámal Eyðfinn Akursmørk, Fríðin Ziskason – Atli Danielsen, Allan Joensen, Símun Joensen, Hjalgrím Elttør – Erling Fles (Ove Nysted, 66.), Eyðun Klakstein (Jón Jacobsen, 76.)
**Gult kort:** Jan Andreasen
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Jákup Olsen (Eyðstein í Lágabø, 63.) Eyun Jacobsen, Kári í Lágabø – Palli Augustinussen, Slobodan Madzar, Milan Kuljic, Dan Djurhuus – Birgir Jørgensen, Predrag Zivkovic
**Gult kort:** Birgir Jørgensen, Dan Djurhuus
**Reytt kort:** Predrag Zivkovic (tvey gul), Slobodan Madzar (tvey gul)

# Molde trý stig

**Nýggi venjarin letur eisini Jákup Mikkelsen sita á beinkinum**

**NOREG**
*Jóannes Hansen*

Í fyrstu royndini eftir venjaraskiftið eydnaðist tað Molde at fáa fulla úrtøku. Teir vunnu á heimavølli 2–1 ímóti botnliðnum Tromsø. Molde var frammanfyri 2–0 í hálvleikinum. Eftir steðgin skoraði Tromsø upp á brotsspark. Eddie Gustafsson var í Molde málinum, og Jákup Mikkelsen var á beinkinum.

Rosenborg hevur fult stigatal eftir sjey tey fyrstu umførini. Tað er besta byrjanin, sum nakað felag hevur fingið, síðani norska kappingin fyrstu ferð varð løgd upp á tann mátan, sum hon er tað. Sunnudagin vann Rosenborg 3–2 í Skien. Odd gjørdi sjálvmál, tá ið tað restaði ein lítil løta, og teir misnýttu brotsspark í síðstu sekundunum.

Sogndal varðveitti næstfremsta plássið við 1–1 á heimavølli ímóti Aalesund.

# Óli framvegis í vanda

**Vejle hevur givið skarvin yvir, og Christian Høgni Jacobsen sleppur ikki upp í part**

**DANMARK 1. DEILD**
*Jóannes Hansen*

Óli Johannesen hevur síðstu dagarnar gjørt sítt fyri, at Hvidovre eisini eftir summarsteðgin skal vera í næstbestu donsku deildini. Hóskvøldið skoraði hann tvey mál, tá ið Hvidovre vann, og sunnudagin var hann á heimavølli partur av nullloysn ímóti B93.

Hvidovre er eitt stig omanfyri strikuna, og B1913, B1909 og HIK eru niðanfyri.

Christian Høgni Jacobsen er ikki partur av Vejle liðnum í løtuni. Vejle hevur annars púra mist luftina, síðani teir mistu møguleikan at flyta upp. Hóskvøldið taptu teir 6–1 ímóti Horsens, og sunnudagin taptu teir 3–2 ímóti Fredericia, sum fekk sigursmálið í síðstu sekundunum. Ulrik Balling skoraði til 1–0 fyriVejle.

Frem hevði ætlað at avgreitt uppflytingina á heimavølli sunnudagin, men tað kiksaði hesa ferð, tí HFK Sønderjylland vann 2–1.